**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 149/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin)** (Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 10. juni 2020, og eftir 1. viðgerð tann 12. juni 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 16. og 17. juni 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri skeinkistøð, epidemikommissiónina, Ferðavinnufelagið, 62N, Hotel Hafnia, Smyril Line, Helgi Rasmussen, landsstýrismann í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen og løgmann, Bárð á Steig Nielsen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bjørt Samuelsen, Johan Dahl, Henrik Old, Bjarni Hammer, Beinir Johannesen og Bjarni Kárason Petersen) hevur hesar viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin biður um tvingsilsheimild í mun til matstovur og skeinkistøð fram til 31. mars næsta ár. Talan er um heimild, har hann kann steingja ella avmarka upp- og afturlatingartíðirnar og avmarka, hvussu nógvir gestir kunnu vera.

Grundgivið verður við tørvi á heimild at forða fyri smittuspjaðing. Men tvingsilsheimildin fevnir einans um ein avmarkaðan part av samfelagnum – tað virksemi, ið er fevnt av Matstovulógini. Og røkkur sostatt ikki aðrastaðni í samfelagnum.

Hóast tað er landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, sum hevur lagt uppskotið fram, so hevur hann undir viðgerðini ikki talað fyri uppskotinum, men víst á, at hann ikki metir, at málið er eitt vinnumál, og at rætti mátin at lóggivið hevði verið ein generel lóggáva, sum ikki einans fevnir um matstovur og skeinkingarstøð.

Farsóttarnevndin, ið er fremsta smittuverjuráðgevingin hjá landsstýrinum, hevur ikki mælt til at gera broytingar í matstovulógini. Tá farsóttarnevndin hevur tosað um, at tað vildi verið hóskandi ella hent við sonevndum tvingsilsamboðum fyri at forða smittuspjaðing, hevur talan verið um generella lóggávu, so sum at herða epidemilóggávuna.

Undir 1. viðgerð av hesum uppskoti tykist sera avmarkað undirtøka av vera fyri málinum; atfinningarsamar røddir vóru úr øllum flokkum.

Føroyar eru í einari serstøðu í mun til koronu, har tað er eydnast okkum at útrudda smittuna. Eingin ivi er um, at nú Føroyar lótu lutvíst upp aftur fyri ferðafólki 15. juni 2020, og talið av ferðandi øktist, so økist eisini vandin fyri fleiri tilburðum av COVID-19 – eins og víst verður á í viðmerkingunum.

Smittuvandin kann verða stórur allastaðni, har nógv fólk savnast, og lagið gerst gott. Nú ætlanin er selektivt at velja eina vinnugrein út, og við tvingsilslóg at kunna avmarka og steingja hesa niður – uttan at talan er um avmarking av øðrum virksemi í samfelagnum, har smittuvandin kann vera eins stórur – gerst spurningurin um endurgjald viðkomandi.

Meðan hjálparpakkarnir eru settir at fara úr gildi longu 30.juni 2020, so verður í mun til hesa tvingsilslóg biðið um heimild heilt fram til 31. mars næsta ár. Kortini er einki í lógini ella viðmerkingunum, sum tryggjar hesum vinnufyritøkum nakað endurgjald, verða tær til dømis stongdar ella avmarkaðar í sínum virksemi, eisini langt aftaná, at hjálparpakkarnir eru farnir úr gildi. Løgmaður vísti í nevndini á, at talan møguliga fór at blíva um okkurt slag av endurgjaldi, sum líkist skipanunum við rakstarstuðli í hjálparpakkunum.

Meirilutin metir ikki, at grundgevingarnar fyri eini lóg, ið avmarkar ein úrvaldan skarða av vinnufyritøkum, halda í mun til verju av COVID19-smittu og harmast um, at ein smidlig loysn ikki er funnin í samráð við allar viðkomandi partar.

Meirilutin minnir á, at føroyingar við samanhaldi og felags ábyrgd hava megnað at basa koronusmittuni – eitt av heilt fáum londum, sum hava megnað tað. Hetta varð gjørt uttan tvingsil.

Skulu allir partar í samfelagnum framhaldandi kenna ábyrgd og lyfta sín part, er avgerandi neyðugt, at samskift verður við allar viðkomandi partar, so undirtøka er fyri teimum átøkum, sum gjørd verða. Tað hevur tíverri fullkomiliga manglað í mun til hetta uppskotið.

Meirilutin tekur ikki undir við málinum, og mælir Løgtingum frá at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Christian Andreasen) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er ein sannroynd, at tað framvegis er ein smittuvandi í føroyska samfelagnum. Vandin er uppaftur størri, nú Føroyar hava latið upp fyri, at ferðafólk kunnu koma til landið. Endamálið við uppskotinum er ikki at steingja matstovur ella skeinkingarstøð, men at myndugleikarnir í eini neyðstøðu skulu hava møguleika at seta neyðug tiltøk í verk til tess at fyribyrgja smittu. Tað er eisini ein sannroynd, at stórur smittuvandi kann standast av, at nógv fólk eru savnað tætt saman í eini matstovu ella á einum skeinkingarstaði. Tað er tí ábyrgdarleyst, at myndugleikarnir ikki hava eina heimild at seta tiltøk í verk til tess at fyribyrja smittu.

Rætta mannagongdin hevði verið at sett tær broytingar av smittulóggávuni í gildi í Føroyum, sum eru samtyktar av Fólkatinginum. Málsøkið er ikki yvirtikið, og henda veruleika eigur føroyska politiska skipanin at fyrihalda seg til. Tær broytingar, sum eru framdar í Danmark innihalda eina røð av møguleikum fyri inntrivum, men hesi inntriv kunnu ikki setast í verk uttan í samráð við føroyskar myndugleikar. Tey tiltøk sum kunnu setast í verk sambært donsku lógini eru í veruleikanum bert ein røð av møguleikum, sum myndugleikarnir kunnu taka til, sjálvsagt bara um hetta er neyðugt og um so er, at onnur minni inntriv ikki hjálpa. Við øðrum orðum er ikki neyðugt hjá føroyska myndugleikanum at taka øll tey stig, sum danska smittulóggávan heimilar, so langt frá tí.

Tað ber ikki til at stýra einum samfelag gjøgnum eina smittukreppu, uttan at myndugleikarnir í ávísan mun hava neyðugar lógarheimildir. Tá tað eftir øllum at døma ikki er politiskur meiriluti fyri

at seta broytingarnar í donsku smittulóggávuni í gildi í Føroyum, eru vit eftir minnilutans meting sett í eina støðu, sum mest kann sammetast við eina neyðstøðu.

Hóast minnilutin metir, at føroyskir myndugleikar ikki hava lóggávuvald á hesum øki, mælir minnilutin til at samtykkja uppskotið, tí tað er eingin ivi um, at lógarbroytingin kann hondhevast, hóast tað fyriliggur eitt ivamál um, hvørt Løgtingið hevur lóggávuvald á økinum.

Umboð fyri matstovur og skeinkistøð hava í hoyringarskrivi til Vinnunevndina boðað frá, at tey kunna taka undir við uppskotinum, um afturlatingartíðin verður sett til kl. 02.00.

Áðrenn ein myndugleiki setur tvingsilsstiltøk í verk, eigur myndugleikin fyrst at royna seg við samráðingum. Uppskotið hjá umboðunum fyri matstovur og skeinkistøð er skilagott.

Verður neyðugt at seta meira avmarkandi tiltøk í verk, eitt nú við at stongja matstovur og skeinkistøð fyrr enn kl. 02.00 er tað samstundis mín fatan, at tað ikki kann útihýsast, at landsstýrið eftir eini ítøkiligari meting ífellur endurgjaldsábyrgd eftir vanligum reglum um endurgjald, tí talan er um eina lóggávu, sum bert umfatar ein ávísan útvaldan part av vinnulívinum.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum, sum tað fyriliggur, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 19. juni 2020**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Johan Dahl<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Henrik Old | Bjarni Kárason Petersen | Beinir Johannesen |
| | Christian Andreasen | |